# Prísirnir á ferðaseðlum hjá Strandferðsluni broytast

**Um ikki so langa tíð fær landsstýrismaðurin nøkur uppskot frá Strandferðsluni um, hvussu prísirnir á ferðaseðlum kunnu broytast**

FERÐASEÐLAPRÍSIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Strandferðslan fer nú at leggja nøkur uppskot fram um, hvussu prísirnir á ferðaseðlum hjá Strandferðsluni kunnu broytast. Eitt uppskot er, at tað skal kosta tað sama við øllum skipunum so at teir dýrastu ferðaseðlarnir verða bíligari bæði hjá ferðafólki og hjá bilum og at teir bíligastu ferðaseðlarnir afturfyrri verða dýrari*

Nú er ætlanin, at prísirnir á ferðaseðlunum við skipunum hjá Strandderðsluni, skulu broytast.

Í longri tíð hevur verið tosað um at broyta prísbygnaðin á ferðaseðlum við skipunum hjá Strandferðsluni.

Tað er tó ongantíð blivið til meiri enn tos.

Men nú sær út til at vera øðrvísi og ætlanin hevur ongnatíð verið so nær sum nú.

Í næstum fer Strandferðslan at handa landsstýrismanninum í vinnumálum nøkur uppskot um, hvussu prísbygnaðurin kann verða.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at í uppskotinum til landsstýrismannin eru fleiri møguleikar nevndir fyri, hvussu prísbygnaðaðurin kann verða.

Hann sigur, at prísirnir á ferðaseðlunum við skipunum hjá Strandferðsluni er ein politiskur spurningur og ætlanin við uppskotinum, sum nú verður lagt fram er eisini, at tað skal vera grundarlagið undir einum politiskum kjaki um prísbygnaðin.

Hann sigur, at uppskotið fevnir bara um ferðaseðlar við skipunum. Hinvegin fevnir uppskotið um bæði vanligar ferðaseðlar og um prísin á ferðaseðlum til bilar.

Kristian Davidsen sigur, at í uppskotunum, verða ymsir prísbygnaðir lýstir við teimum fyrimunum og vansum, teir hava við sær.

Samstundis eru útrokningar gjørdir, hvussu teir annars fara at ávirka Strandferðsluna.

Hann leggur tó afturat, at uppskotini byggja á, at tey skulu hvørki geva Strandferðsluni størri ella minni inntøkur, enn hon fær í dag og at játtanin á fíggjarlógini verður tann sama, sum hon er nú.

Sjálv hevur Strandferðslan ikki nakað tilmæli um, hvønn prísbygnað, hon sjálv heldur vera tann besta.

– Í uppskotunum til landsstýrismannin hava vit lýst ymsar møguleikar fyri at geva politikarum eitt grundarlag at viðgera málið á.

**Fleiri møguleikar**

Kristian Davidsen sigur, at tosað vit um prísbygnaðin, kunnu fleiri møguleikar verða. Ein møguleiki kann vera, at jú longri ein siglur, jú dýrari skal ferðaseðilin verða.

Men hann sigur eisini, at ein annar møguleiki, ið er nevndur í uppskotinum, sum landsstýrismaðurin fær í næstu framtíð, er, at allir ferðaseðlarnir skulu kosta tað sama.

– Ein samhaldsfastur prísbygnaður er eisini eitt av uppskotunum, sum vit leggja fyri landsstýrismannin, sigur stjórin á Strandferðsluni.

Eftir tí uppskotinum, verða prísirnir á øllum skipunum tann sami.

– Tað merkir, at ongin skal vera fyri vanbýti fyri tað, um tey búgva langt burtur frá miðstaðarøkinum, tí tey skulu hava somu møguleikar at ferðast ímillum sum tey, ið búgva tætt við miðstaðarøkið.

Sostatt kemur prísurin á teimum dýrastu ferðaseðlunum, sum eru ferðaseðlarnir ímillum Suðuroynna og Havnina at verða bíligari, hann kostar í løtuni 75 krónur. Hinvegin kemur prísurin á teimum bíligastu ferðaseðlunum, sum er 35 krónur, at dýrka.

Hann sigur, at eitt annað uppskot er at varðveita bygnaðin, sum nú er, men at gera hann einfaldari, so at tað ikki vera so nógvir ymiskir prísir.

**Bíligari til útoyggj**

Áður hevur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, upplýst fyri Sosialinum, at hann ætlar at seta 700.000 - 800.000 krónur av á fíggjarlógini til útoyggjarnar. Hendan upphæddin skal markast til at gera tað bíligari at ferðast við skipunum hjá Strandferðsluni ímillum útoyggjarnar og meginlandið.

Kristian Davidsen sigur, at hendan ætlanin hjá Landsstýrismanninum má so samantvinnast við ætlanina at broyta prísbygnaðin, men akkurát, hvussu tað verður gjørt, veit hann ikki enn.

# Letur handil upp sum brúk er fyri í Suðuroy

**Í dag letur nýggjur handil upp á Tvøroyri við ítróttar- og frítíðarklæðum**

NÝGGJUR HANDIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í eina tíð hevur Elin Dimon Næs búð í Noregi. Har arbeiddi hon eitt skifti í einum handli, sum seldi frítíðar og ítróttarklæðir til børn og ung.

Sjálv er hon av Tvøroyri og tá kom hon at hugsa um, at einum slíkum handli var eisini brúk fyri í Suðuroynni.

Sum sagt so gjørt og í dag letur hon nýggjan handil upp á Tvøroyri.

Frítíðarhornið, sum handilin eitur, liggur mitt á Tvøroyri í húsunum hjá Tvøroyrar Handverkarafelag.

Í handlinum verður dentur lagdur á at hava ítróttar- og frítíðarklæðir til børn og ung. Men hon hevur eisini vetrarklæði og skógvar, og úrvalið er eisini kryddað við ymsum til vaksin.

Finskt handverk er heimsgitið fyri dygd og snið og tí dylir Elin Dimon Næs heldur ikki fyri, at hon er fegin um at hon er sloppin at umboða finska klædnamerkið Reima, men hon hevur eisini onnur merki.



*Hesar seinastu dagarnar hevur Elin Dimon Næs havt úr at gera við at innrætta handilin, men nú er komið undir land og í dag letur nýggi handilin upp*

*Myndina tók Jón Næs*

Frítíðarhornið fer at hava framsýning á bilasølustevnuni, sum verður í ítróttarhøllini á Tvøroyri hetta vikuskiftið. Annars er handilin opin seinnapartarnar, frá klokkan 13 til 18, men leygardagar er opið frá klokkan 10 til 13.



# Túsundtals lundar og seyður upp í royk



*Heldur enn at enda í kølidiskinum hjá eitt nú Keypsamtøkuni, fór fesk, íslendskt lambskjøt á Sandvíkahjalla og upp í ES-royk*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Leskiligt seyðakjøt út Íslandi mátti brennast í síðstu viku, tí tað livdi ikki upp til ES-krøv. Talan er um tíggjutals tons av bæði seyði og lundum, sum føroyskar heilsølur hava innflutt. Heilsufrøðiliga starvsstova hevur steðgað kjøtinum á bip-støðini í Kollafirði, tí tað var ikki heilt so kalt, sum kravt verður í ES-reglum**

MATVØRUTRYGD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Gott íslendskt kjøt og lundar í hópatali av Vestmannaoyggjunum vóru í síðstu viku brend á Brennistøðini á Hjalla. Orsøkin er, at matvørurnar ikki livdu upp til strongu ES-krøvini, sum marknaeftirlitsstøðin í Kollafirði setir til vørur úr triðjalondum.

Marknaeftirlitsstøðin í Kollafirði er eitt úrslit av ES-avtaluni frá 2001. Allar vørur skulu kannast viðvíkjandi góðsku og merking.

Talan er um tvær ymiskar sendingar av matvørum úr Íslandi, sum heilsølurnar Poul Hansen, K-heilsøla og Føroya Keypsamtøka hava fingið fraktað til Føroya við íslendska farmaskipinum Ernir.

**Minst 9 tons av kjøti**

Sambært Árna Dam, stjóra á Skipafelagnum, sum er umboð hjá skipinum, var talan um níggju tons av seyðakjøti, sum kom fram 8. september, og eini 17 tons, millum annað 2000 lundar, síður og ryggjastykkir av seyði, sum komu 15. september.

– Lastin skal vera minst 18 kuldastig. Tá kannað var á bip-støðini í Kollafirði, lá fyrsta lastin milllum 13 og 15 kuldastig, og tann seinni lastin hevði bara 5,5 kuldastig. Tað er bara loyvi at liggja 3 hitastig undir, so lastin slapp ikki í handlarnar. Hatta var allar fínasti matur, sum eingin hevði tikið skaða av at etið hann, men eftirlitið er vorðið so strangt, at har er einki at gera. Og tað er eisini í fínasta lagi. Vit mugu liva upp til altjóða krøvini, sigur Árni Dam.

Tey fyrstu níggju tonsini eru longu brend, men óvíst er, hvør lagnan hjá teimum næstu 17 tonsunum er. Tað ljóðar, at tey skulu aftur til Íslands. Innflytarin hevur 60 dagar at fáa vøruna av landinum. Í øllum førum er greitt, at tey ikki koma í føroysku køli- og frystidiskarnar.

**Fyri milliónir**

Skivan í íslendska farmaskipinum, sum er ein gamal íslendskur trolari, vísti annars 21 kuldastig, tá hann varð kannaður í Kollafirði. Sostatt er tað neyvan skipinum, tað er galið við, men helst flutninginum annars. Kanska hevur vøran staðið ov leingi á bryggjuni í Íslandi, ella kanska er okkurt galið við bilflutninginum. Tað verður nú kannað.

Enn er ikki gjørt neyvt upp, men greitt er, at talan er um eina milliónupphædd í søluvirði, sum er farin fyri skeytið.

Føroysku fyritøkurnar missa einki av málinum skilst, tí vøran beinanvegin varð afturvíst á bryggjuni í Kollafirði. Báðar lastirnar vóru tryggjaðar. Tryggingarfeløgini keglast nú um, hvør skal rinda, og tí verða neyvar kanningar gjørdar, so ábyrgdin kann staðfestast.

# Eingin góða mamma hjá ES

**Tað kann tykjast ógvusligt at brenna góðan mat, sum ikki er heilsuskaðiligur. Men ES-krøvini eru til at halda, og tí er eingin góða mamma. Tað snýr seg bæði um umdømi og trygd fyri góðsku, sigur Ingibjørn Egholm, djóralækni á Heilsufrøðigu starvsstovu**

MATVØRUTRYGD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er Heilsufrøðiliga starvsstova, sum hevur afturvíst tíggjutals tons av góðum íslendskum kjøti hjá trimum føroyskum heilsølum á eftirlitsstøðini í Kollafirði.

Allar kjøtvørur, sum koma úr einum triðja landi í ES-samanhangi, skulu kannast á marknaeftirlitsstøðini í Kollafirði. Kannað verður fyri temperatur, merking og um talan er um mannaføði.

– Um eftirlitið vísir, at vøran ikki hevur rætta kuldan, so afturvísa vit vøruna. Er talan um heilsuvanda, so skal hon burturbeinast beinanvegin, men er talan bara um krøv, sum ikki eru uppfylt, fær innflytarin valið ímillum at burturbeina vøruna ella senda hana aftur, sigur Ingibjørg Egholm, djóralækni á eftirlitsstøðini í Kollafirði.

Marknaeftirlitsstøðin í Kollafirði er eitt úrslit av ES-avtaluni frá mars 2001. Tá fingu føroyskar fiskavørur frítt at fara til ES, men treytin var, at triðjalandsfiskur fyrst var kannaður gjølla á eini sonevndari bip-støð. Føroyingar fingu ikki loyvi útflyta kjøtvøru á ES-marknaðin, men kjøt, sum kom frá triðjalondum til matna í Føroyum, skal eisini kannast. Sama skilið er við livandi djórum, sum koma til Føroya. Ísland er í hesum sambandi eitt triðjaland, tí tað ikki er partur av Evropasamveldinum.

Eitt krav er, frystivørur skulu hava minst 18 kuldastig. Í hesum føri vóru tær millum 13 og 15 stig. Spurd, um tað ikki er í so harðrent av Heilsufrøðiligu starvsstovu at afturvísa slíka vøru, sum er góð mannaføði, svarar djóralæknin:

– Um vit ikki halda ES-reglurnar, so er eingin grund at hava tær. Eitt er, at vit mugu hugsa um okkara umdømi, men eitt annað er eisini, at er vøran undir tey 18 kuldastigini, so vita vit ikki, hvat er hent við vøruni. 18 kuldastig er eitt vanligt mark at seta til frystivørur, sigur Ingibjørg Egholm.